# FT Samskifti - Suðuroy

## Montørur - avloysari í 1 ár

*"Tað er gott at lygnin er til. Hugsa tær, um alt tað, sum tú hoyrdi, var satt"*

- Albert Engström



Søkt verður eftir einum montøri til FT Samskifti í Suðuroy. Talan er um avloysarastarv í 1 ár.
Arbeiðið er í stóran mun nýgerð og viðlíkahald av telefoninstallatiónum og installatión av breiðbandi.

Vít kunnu bjóða eitt áhugavert arbeiði við atliti til:

- Nýgerð og viðlíkahald av telefon-installatiónum og breiðbandi
- Vanliga telefonútgerð
- Vekslarar
- Innanhýsis kaðalskipanir
- Uttanhýsis kaðalskipanir
- Teleterminalar av ymiskum slag
- Internet
- At ráðgeva kundum um útgerð og tænastur.

**Útbúgving og royndir:**
Elektronikkmekanikari, elektrikari, líknandi útbúgving og/ella hollar royndir við montør-/kaðalarbeiði.

Tað er ein fyrimunur, at tann, ið sett/-ur verður, í stóran mun kann arbeiða sjálvstøðugt, er opin og dugir væl at samstarva og tosa við kundar og hevur royndir innan EDV á brúkarastøði.

Uppmøtingarstaður er Føroya Tele á Tvøroyri, og arbeitt verður í allari Suðuroynni.
Byrjanardagur er skjótast til ber.

Starvið er lønt sambært sattmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið galdandi fyri Føroya Tele.

Áhugað kunnu venda sær til Niels Hammer, leiðara fyri FT Samskifti í Suðuroy, ella Starvsfólkadeildina á tel 30 30 30.

Umsóknir við viðmælum og prógvum skulu vera Starvsfólka-deildini í hendi í seinasta lagi mánadagin 2. oktober 2006 og skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
FO-110 Tórshavn

**FT Samskifti er dótturfelag Føroya Tele. Felagið rekur alla kundarøkt, alla sølu og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-økið og alla stoðarútgerð fyri fastnetstelefoni og breiðband. FT Samskifti gevur nýggjar møguleikar at veita betri og bíligari tænastur til kundarnar. Í felagnum starvast 115 fólk. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele.**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*



# Leiðari til Kundatænastuna

Vit sóknast eftir eini eldsál at standa á odda fyri Kundatænastuni hjá Føroya Sparikassa.

Kundatænastan er eitt týðandi bindilið millum kundan og Føroya Sparikassa, og ein avgerandi liður í arbeiðnum at røkka visjón okkara at vera kundavinaligasti peningastovnur í landinum.

Í Kundatænastuni svara og avgreiða vit fyrispurningum frá kundum, veita ráðgeving og sølu og stilla telefonir um til deildirnar. Kundatænastan er í støðugari menning og vit miða ímóti, at Kundatænastan sum frálíðir kann selja og ráðgeva um øll viðurskifti, so sum íløgur, pensjónir, tryggingar og smærri lán.

Sum leiðariført tú ábyrgdina av at samskipa og tilrættisleggja arbeiðið á deildini, at tryggja samstarvið við allar deildir og starvsbólkar í samtakinum, umframt at syrgja fyri, at deildin støðugt veitir bestu innanhýsis og uttanhýsis tænastuna.

Vit vænta, at tú hevur viðkomandi útbúgving, hugsar sjálvstøðugt, tekur sjálvstøðugar avgerðir og ert jalig/ur og motiverandi í samstarvi við onnur. Tú hevur ábyrgdarkenslu, dugir at seta røttu krøvini, og trívist í einum skundmiklum umhvørvi.

Starvið er spennandi og avbjóðandi, og møguleikarnir fyri persónligari og fakligari menning eru góðir.
Kundatænastan húsast í høvuðssæti Sparikassans Yviri við Strond 2 í Havn.

Starvið verður sett skjótast gjørligt og lønin verður ásett eftir avtalu.

Áhugað eru vælkomin at venda sær til Marjuna Eystberg á telefon 348510 ella við telduposti til marjun.eystberg@sparikassin.fo

Umsóknir skulu verða starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi fríggjadagin tann 22. september 2006, og skulu stílast til:

FØROYA SPARIKASSI
Att.: Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðari
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

ella sendast sum teldupostur til:
marjun.eystberg@sparikassin.fo

Visjónin hjá Føroya Sparikassa er at vera brúkaravinaligasti peningastovnur í Føroyum. Á 17 privatkunda- og 2 vinnukundadeildum kring landið veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Í samtaki Sparikassans eru tvey dótturfeløg: Húsameklarafelagið INNI og Eik Bank. Í samtakinum starvast 259 fólk og í Kundatænastuni starvast 11 fólk.

petur & petur • 320870

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo